## Dreymafina í Copa America

Tað verður Argentina, sum skal spæla finaludyst móti Brasil í kappingini um suðuramerikanska meistaraheitið. Í gjárkvøldið spældi Argentina sína hálvfinalu móti Mexico, og endaði hendan við 3-0 sigri til Argentina. Ikki minst var Lionel Messi í fokus, tá hann við einum perlumáli skeyt Argentina upp á 2-0. Undan hesum hevði Gabriel Heintze skorað til 1-0, meðan Juan Riquelma skoraði seinasta málið í dystinum. Finalan í Copa America verður spæld sunnudagin.



## Hushovd var skjótastur

Norski Thor Hushovd var skjótasti maðurin, tá fjórða etapan í Tour de France varð avgjørd við fjølspurti. Stutt undan málinum høvdu fimm súkklarar skrætt seg leysar, men høvuðsfeltið vann teir aftur, og so gjørdist talan um veruligan fjølspurt. Her var stóri normaðurin skjótasti súkklarin, og so kundi hann fegnast um sín fyrsta sigur í nærum heilt álmanakkaár. Fabian Cancellara er framvegis maðurin, sum súkklar í gulum í stóru súkklukappingini.

## Ein øgiligur lætti

**HB-liðskiparin helt tað vera langt síðani, at teir á liðnum høvdu fegnast somikið nógv um ein sigur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Turbolensurin kring HB hevur verið stórur seinastu tíðina. Misjøvn avrik og úrslit hava sent liðið úr oddastríðnum í FM-kappingini, og fyri tveimum vikum síðani kókaði yvir, tá Krzysztof Popczynski fekk sekkin frá leiðsluni í felagnum.

Ein mélleysur javnleikur í Vági stutt eftir fekk heldur ikki sissað viðhaldsfólkini nakað serligt, men við sigrinum í gjár hevur HB í øllum førum rokkið fremsta málið, sum varð sett við nýggja venjaranum.

- Ja, hetta var ein stórur lætti hjá okkum. Í FM-kappingini eru vit meira ella minni afturúrsigldir, og tí er steypakappingin nú fremsta málið hjá okkum. Tað kravdi, at vit ikki tveittu nakað burtur í Vági, og tíbetur hildu vit eisini fast, sigur Jákup á Borg, sum saman við liðfeløgunum fegnaðist um sigurin.

- Tað kanst tú ætla. Hetta tók eina stóra byrðu av okkum, og fagnaðurin eftir sigurin var øgiligur. Ja, tað er langt síðani, at vit hava verið somikið fegnir um ein sigur, heldur hann.

Spurdur, hvørt hann heldur, at HB við hesum hevur lyft seg úr kreppuni, svarar Jákup, at tað fer hann ikki at svara fyri her og nú.

- Tað fer tíðin at vísa. Men við hesum fingu vit í øllum førum eitt ordans lyft. Fólk funnust kanska at okkum, tá vit spældu 0-0 í Vági herfyri, men tað haldi eg nú slettis ikki var so galið. Tann dystin var setningurin, at vit nú skuldu fyrireika okkum til steypakappingina og Europa-Cup. Steypafinaluna rukku vit í gjárkvøldið, og vit hava nú tvær ferðir á rað hildið nullið. Og tað er so avgjørt ikki tað, sum vit hava verið bestir til í ár. So eg haldi avgjørt ikki, at vit skulu vera serliga ónøgdir her og nú.

- Nú kunnu vit so fara í summarfrí við røttum ryggi. Talan verður kanska ikki um nakra langa feriu, tí longu mikudagin byrjar venjingin aftur. Men tað er ein góð kensla hjá okkum øllum, at vit nú hava reist okkum nakað, sigur Jákup á Borg.

VB/Sumba-HB 0-1 (0-0):

# HB rakk málinum

**VB/Sumba royndi at sjokkstarta, men tá trýstið hevði lagt seg, sat HB á seinasta tímanum av dystinum, sum teir kundu vunnið ruddiliga**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við kreppustøðuni, sum HB hevur verið í, var ikki løgið, at VB/Sumba royndi at leggja bragdliga fyri á Eiðinum í gjár.

Heimaliðið skuldi eisini vinna 3-1 leiðsluna hjá HB aftur, og teir byrjaðu eisini sum óløgi. Talan gjørdist kanska ikki um teir heilt stóru møguleikarnar, men longu eftir tveimum minuttum vildu vertirnir hava brotsspark, tá beinini vórðu tikin undan spælara í brotsteiginum. Floytan hjá dómaranum tagdi tó, og tí fekk VB/Sumba ikki ta ynskisbyrjan, sum teir høvdu vónað.

### Skuldu avgjørt

Og spakuliga fjarðaði trýstið. HB-verjan stóð stinn hóast ágangin, og tá fyrra umfarið var hálvrunnið gekk aftur meira javnt fyri seg.

Ella kanska var tað HB, sum tók meira yvir. Í øllum førum megnaðu teir betri at spæla seg til møguleikar, og hesir gjørdust avgjørt ikki færri, sum dysturin leið.

Seinna hálvleik sótu gestirnir á tí allarmesta, og teir bæði áttu og skuldu skorað upp á onkrar av stóru møguleikunum, sum vórðu skaptir. Men høvrki Andrew av Fløtum, Christian Høgni Jacobsen, Milan Kuljic ella Ólavur S. í Ólavsstovu vóru nóg neyvir, tá teir fingu meira ella minni 100% møguleikar.

Ólavur gjørdi tó sjálvur skaðan góðan, tá hann stutt fyri leiklok avgjørdi dystin. Eitt mál, sum sendi HB í enn eina steypafinalu.



*Atfinningarnar móti HB-verjuni hava verið nógvar í ár. Men mikukvøldið hildu teir nullið annan dystin á rað*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

# Landavegssúkkling á vestanstevnu

**40 kilometrar av landavegssúkkling eru á skránni, tá vestanstevnan verður um vikuskiftið**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er Tórshavnar Súkklufelag, sum skipar fyri kappingini, sum er fyri bæði børn og vaksin. Kappast verður í trimum bólkum fyri ávikavist gentur og dreingir, umframt at tey vaksnu kappast í bólki fyri seg.

Yngstu súkklararnir kappast á einum teini, sum er tveir kilometrar til longdar, meðan tey vaksnu kappast á 40 kilometrum.

Allir súkklarar møtast við kirkjuna í Sørvági, har starturin og mál verður. Súkklað verður móti Bø, har vent verður, og so aftur inn í Sørvág, har málið er.

Tað er krav, at súkklararnir nýta hjálm, tá luttikið verður. Tilmelding til kappingina er á staðnum ein hálvan tíma undan sjálvari kappingini. Hjá teimum vaksnu byrjar hendan klokkan 10. Yngru súkklararnir byrja klokkan 13.

*Súkklukappingar eru fastur partur av stevnunum kring landið*

